# Loyvi krevst til nýggjársbálið

**Tey, sum ætla at skipafyri nýggjarsbáli, skulu hava loyvi frá avvarðandi kommunu, áðrenn kynt verður. Og ikki er heldur loyvt at brúka bálið sum ruskpláss**

NÝGGJÁRSHALD
*Edvard Joensen*

Nýggjársbálini,sum kynd verða kring landið, skulu øll fráboðast avvarðandi kommunu í so mikið góðari tíð, at formligt loyvi kann gevast at hava bálið.

Hesum boðar Heilsufrøðiliga Starvsstovan frá í tíðindaskrivi, sum sent er út millum jóla og nýggárs.

Tað er bert loyvt at brenna burturkast, sum ikki dálkar, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

Og dálkandi burturkast kann vera so mangt. Eitt nú viðgjørdur viður. Tað verið seg trykkinpregneraður ella málaður. Slíkt má ikki koyrast á bálið, tí tað kann geva dálkandi og vandamiklan royk frá sær, sigur starvsstovan.

Hinvegin er nýggjárbálið eitt gott høvi til at sleppa sær av við jólatræið og alt pappírið, sum ivaleyst liggur eftir frá jólapakkunum.

Men at tøma kjallaran ella bilhúsið er eingin loysn. Tað er beinleiðis ólógligt, skilst á tíðindaskrivinum, Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sent út.

Men tað er ikki bara at skipa fyri og brenna sjávt bálið.Tann sum ábyrgdina hevur av hesum, hevur eisini ábyrgdina av, at leivdirnar verða tiknar uppaftur og fyribeindar á nøktandi hátt.

Tað er meira enn so komið fyri, at fólk hava sitið við ampa nýggjársaftan, tá rúgvurnar eru farnar at vaksa uttan fyri húsini. Hugt og lurtað hevur veerið eftir veðurvánunum, og mett hevur verið um, hvussu vindurin nú man fara at skikka sær.

Tað liggur eisini tí, sum skipar fyri, til ábyrgdar at syrgja fyri, at ikki óneyðugur ampi og ella vandi stendst av slíkum bálum. Hetta er eisini ein góð orsøk til, at kommunan skal geva loyvi tila t hava bálið og gera av, hvar eitt slíkt kann leggjast.



*Tað liggja nógvar treytir við at brenna bál á nýggjárinum. Loyvi skal fáast frá kommununi, áðrenn kynt verður*

**Frá Stráluni**
Stóra tøkk øll tit, ið hava stuðlað og hjálpt okkum nú árið skjótt at enda er.

Vit ynskja tykkum eitt gott nýggjár.

STRÁLAN

Felagið fyri Bilhandlar og Verkstaðseigarar ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

FBV
FELAGIÐ FYRI BILHANDLAR OG VERKSTAÐSEIGARAR

***Nýggjársheilsan til fam. Mørkøre***

***Øllum tykkum, sum eg var saman við í summar, ynski eg eitt av Harranum vælsigna nýggjár við tøkk fyri árið, ið fór. Ein serstøk tøkk til tykkum, sum skipaðu fyri einum ógloymandi og hugnaligum degi, tá øll familian var savna.***

***Heilsan Beata***

# Kunningarkvøld um útbúgvingar uttanlands á Kambsdali

ÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Týsdagin tann 6.januar 2004 kl 19.30 skipa Altjóða Skrivstovan saman við lestrarvegleiðarunum á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum og á Handilsskúlanum á Kambsdali fyri kunningarfundi um víðari útbúgvingar uttan fyri Danmark.

Tiltakið verður í Studentaskúlahøllini á Kambsdali og er alment og ókeypis.

Allir nærmingar við miðnámssularnar, tað veri seg studentaskúla, HF, HHX ella HTx, eins og onnur áhugað í víðarigangandi útbúgvingum uttanlands eru væl komin.

Freistirnar til nógvar útbúgvingar nærkast, um tú hevur hug at fara undir lestur eftir summarfrítíðina.

– Tí hava vit í forleingilsi av »Markleys Útbúgving« í desember í ár fingið nøkur føroysk lesandi í útlandinum at greiða frá um ymsu útbúgvingarnar, meðan tey eru heima í jólafrí, sigur Altjóða Skrivstovan í tíðindaskrivi.

Nakrir (4-5) føroyingar, sum allir eru undir útbúgving uttanlands, fara m.a. at greiá frá.

1. um sínar tankar og ætlanir við at fáa sær útbúgving uttanlands

2. um mannagongdin, tá tey søktu, og fíggjarligu viðurskiftini í sambandi við lesturin

3. fyrsta tíðin í útlandinum

4. um góð og trupul viðurskifti undir lestrinum, bæði av fakligum og sosialum slag

5. hugsanir í sambandi við at venda aftur til Føroyar

Eftir at studenternir hava greitt frá sínum hugsanum verður høvi at seta teimum spirningar og at hava orðaskifti um útbúgvingarviðurskifti.

Síðani fer leiðarin á Altjóða Skrivstovuni í Havn, Holger Arnbjerg, at greiða frá møguleikunum at lesa partvís ella burturav uttan fyri Danmark. Hann fer at viðgera mannagongdina í sambandi við umsóknina, fíggjarviðurskifti og onnur praktisk viðurskifti í hesum sambandi.

Tey som fara at taka lut eru:

Eiler Fagraklett, 24 ár, fra Kollafjørður, lisið 2 1/2 ár - BA (Hons.) Advertising and Marketing á Lancaster University.

Ása Johannesen, 20 ár, úr Tórshavn, lisið 1/2 ár - BSc(Hons) Animal Behaviour & Welfare á Myerscough College, University of Lancashire í Preston.

Maiken Poulsen, 43 ár, úr Tórshavn, lisið 3 á Fróðskaparsetri Føroya og 1/2 ár sum skiftisstudentur við Stockholms Universitet í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Ditte M. Joensen, nýútbúgvin frá fra Academia Italiana, Firenze - æi Graphic design & Visual Communications

**Fyrireikarar eru:**
Lestrarvegleiðararnir við skúlarnar á Kambsdali: Óli Wolles, Turið Thomsen, Karl Olsen og Maria Greggersen.
Altjóða Skrivstovan ved Holger Arnbjerg - ask@ask.fo - Tlf. 322065

**Tøkk**

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaði pápi, verpápi og abbi okkara

**Petur Z. Hentze**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur og til øll tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til áðrenn og aftaná jarðarferðina.

**Marita, Dania, Hans Pauli og Karolina v/ fam.**

**Tøkk**

Vit takka øllum hjartaliga, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi og abbi

**Andrass Hansen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum vóru um hann undir hansara longu sjúkralegu.
Ein serstøk heilsan til starvsfólkið á B6.
Tøkk til Svenning á Lofti fyri sang og troystarrík orð.
Hjartaliga takka vit øllum, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervinum.
Eini gleðilig jól og gott nýggjár ynskist tykkum øllum.

**Óluvá, Súsanna, Jensina og lítla Óluvá**



# Friðarlig jól hjá løgregluni

**Politistøðirnar kring landið lata sera væl at jóladøgunum, sum júst eru farnir afturum bak**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki verið nógv hjá politinum at gera um jólini. Politistøðirnar kring landið hava ikki havt meira at gera enn vanligt er, sjálvt um nógv fólk hava verið í býnum.

Í høvuðsstaðnum hevur verið rættiliga friðarligt. Leygarkvøldið var onkur tó farin til hendurs uppi við Badmintonhøllina, men tað kom skjótt í rætt lag aftur.

Annars lata hinar politistøðirnar somuleiðis væl at jóladøgunum. Eini tveir førarar eru tiknir fyri spritsuskoyring, og í Suðuroynni var ein lítil eldur í einum sethúsum. Har var tó lítil skaði.

Politiið í Havn upplýsir eisini, at tað eru fleiri, sum hava ringt yvir alarmsentralin, tí tey eru dottin og komin til skaða í hálkuni.

# Nógv hálkuóhapp kring landið

**Kavin sum um jólini legðist kring landið hevur ført til nøkur ferðsluóhapp. Lukkutíð er ongin komin álvarsliga til skaða**

FERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Nógvir bilar hava koyrt seg í óførini í kavanum, sum legðist nú um jólini. Av politistøðini í Havn verður upplýst, at eini fýra bilar vóru farnir útav á Hjalla. Og vóru øll óhappini orsakað av hálku og vánaligum koyrilíkindum. Sjálvir bilarnir fórust illa, men ongin álvarsamur persónsskaði hevur verið.

Somuleiðis í Suðuroynni hava fleiri smærri ferðsluóhapp verið um jólini. Millum annað fór ein bilur útav vegnum í Lopra. Har fór bilurin í knús og førarin varð fluttur á sjúkrahúsið. Hann fekk tó ongan skaða.







